## Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistin til kommunuvalið tann 21. november 2000 fyri Leirvíkar Kommunu liggur frammi til alment eftirlit í døgunum

frá 24. oktober til 06. november 2000

á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð.

Kæra um at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi tann 15. november 2000.

Valkort verða send øllum í Leirvíkar kommunu, ið samb. vallistan hava atkvøðurætt til kommunuvalið tann 21. november 2000.

Valkortini verða send øllum veljarunum í viku 45.

Veljarin skal hava kortið við sær, tá ið valt verður.

Leirvík tann 18.10.2000

**Leirvíkar Kommuna**

## Leys størv á Fiskaaling P/F

Við hesum verður søkt eftir tveimum álítandi starvsfólkum til Fiskaaling P/F. Tey, ið sett verða í starv, skulu, saman við øðrum, arbeiða í vaktarskipan felagsins. Hetta inniber, at tey mugu vera fyrireikaði at arbeiða skiftandi arbeiðstíðir. Tað er ikki ein treyt, men ein fyrimunur um umsøkjari hevur arbeiðsroyndir frá smoltstøð ella annan førleika, sum kann gagnnýtast í starvinum. Hevur tú áhuga fyri einum spennandi og avbjóðandi starvi, kanst tú seta teg í samband við Fiskaaling P/F, Símun Joensen. Umsóknir við frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligu útbúgving skulu sendast til:

**Fiskaaling P/F**
Við Áir
FO-430 Hvalvík
Telefon 474747
Teldupost:
Fiskaaling@fiskaaling.fo

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. oktober 2000.

## Frá 1000 ára haldinum

Leygardagin 21. oktober kl. 11.30 verður kirkjukonsert (matiné) í Havnar Kirkju.

Petra Iversen syngur
Stamen Stantchev, piano,
og Edvard Nyholm Debess, kontrabass
spæla sálmar

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 - tlf. +298 321132 - fax +298 321761 - FO-110 Tórshavn

## Kunngerð

Gjørt verður kunnugt, at **vallistarnir** til býráðsvalið tann 21. november 2000 liggja frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð:

**frá fríggjadegnum 20. oktober til fríggjadagin 3. november 2000.**

**Kæra** um at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi:

**týsdagin 14. november 2000**

verða send valnevndini, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

Klaksvík tann 18. oktober 2000
**Klaksvíkar Býráð**

## Handverkarar

### søkjast til

## Elfelagið SEV

Søkt verður eftir tveimum handverkarum at arbeiða sum linjumenn hjá SEV.

Arbeiðsøkið verður fyri meginpartin í Suðurstreymoy. Arbeiðið fevnir um hald og nýgerð av linjum, kaðalum og trafostøðum.

Handverkarar við sveinabrævi sum elektrikarar hava fyrimun, men kunnu fólk við aðrari handverkaraútbúgving eisini koma upp á tal, t.d. jarn- og húsasmiðir. Umsøkjarar skulu kunna byrja í starvinum innan 1. januar 2001.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Peter L. Gaardbo hjá SEV á tlf. 311366.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 20. november 2000.

*Tórshavn, tann 18. oktober 2000*

**Elfelagið SEV**

## Hugsa tit um jólaborðhald?

Bíleggi í góðari tíð – Vit bjóða hugnalig høli og fjølbroytt sjálvtøkuborð til smáar bólkar (uml. 30 fólk).
Komið inn á gólvið og práti við okkum og hoyr um prís og matskrá

**Café Karlsborg**

Á bryggjubakka • Tel. 317464 og 221379

## Ársfundur hjá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum

**Leygardagin tann 21. okt. 2000 kl. 14.00** skipar Rúsdrekka & Narkotikaráðið fyri ársfundi á Sjómansheiminum í Runavík.

Í ár verður evnið: **»Børn, sum vaksa upp í heimum, har rúsevni verða misnýtt«.**

Ráðið hevur biðið Lisbeth Rask, kliniskan sálarfrøðing, sum í nógv ár hevur starvast við børnum og familjum, at halda fyrilestur um hvussu vit kunnu hjálpa hesum børnum og foreldrum teirra.

Haraumframt hava vit heitt á tvey onnur, sum í Føroyum hava havt tilknýti til henda trupulleika, at siga sínar hugsanir um evnið.

Fundarskráin er hendan:

**Kl. 14.00:** Formaðurin bjóðar vælkomin
**Kl. 14.10-15.00:** Lisbeth Rask heldur fyrilestur
**Kl. 15.00-15.20:** Kaffisteðgur
**Kl. 15.20-15.30:** Beate L. Samuelsen, formaður fyri Barnaverndini í Havn, lýsir evnið frá barnaverndarinnar sjónarhorni
**Kl. 15.30-15.40:** Arne Ludvig, fyrrverandi skúlastjóra, lýsir evnið frá skúlans sjónarhorni
**Kl. 15.40-15.50:** Formansfrágreiðing
**Kl. 15.50-16.10:** Orðaskifti

## Frá Føroya Lærarafelag

Í sambandi við arbeiðsósemju millum grønlendska lærarafelagið IMAK og Grønlendska landsstýrið mælir Føroya Lærarafelag limum felagsins frá at søkja lærarastørv í Grønlandi.

## Hvalbiar skúli

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá uml. 1. desember og 24 vikur fram. Tímatalið er 27 tímar um vikuna.

Lærugreinir: Tekstviðgerð 8.-9. fl., Landalæra 6.-7.-8.-9. fl., føroyskt 1.-3. fl., serundirvísing, bókasavn og flokslærari hjá 1. fl.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 6. november 2000.

**Hvalbiar Skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba



## nøvn nú

### Heilsanir



***Góa Evida Jane***
Hjartaliga tillukku vi› tí runda degnum. Alt ta› besta í framtí›ini.
***Heilsan mamma og Poul Johannus***





***Gó›a Kristianna***
Vit ynskja tær tillukku vi› 1 ára fø›ingardegnum 22.10. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Vulomman og Ey›bjørg***



***Gó›a Bjørt***
Hjartaliga tillukku vi› 7 ára degnum. Harrans signing í framtí›ini ynskja
***vit øll, mamma og babba***



***Gó›u Saloma og Arnborg***
Hjartaliga tillukku á 16 og 3 ára døgunum tann 20.10. Ein heilsan til Jákup.
***Heilsan mamma og babba, Heina gumma og Heini gubbi***



***Gó›a, fitta Johanna***
Hjartaliga tillukku vi› 2 ára degnum 20.10.
***Heilsan omma, abbi og Høgni***



***Gó›a Evida***
Er ta› 30 tú fyllir!!? Alt ta› besta ynskja vit tær.
***Heilsan Diana og Kristoffur***



***Gó›a Annvør***
Alt ta› besta í tínum fyrsta tannári. Naka› ert tú vaksin sí›ani hesa mynd. Vit elska teg.
***Linda, Torfrid og babba***



***Gó›a systir***
Hjartaliga tillukku vi› degnum.
***Heilsan lítli beiggi Bár›ur***




Ja, statt nú vi› hárinum ni›ur eftir nakkanum hin gamli. Fjálturs aldurin er vi› at fara aftur um bak!!! Hvør skuldi trú, at hesin sprelski tr‡ssari fullveldis-unglingi nú er vor›in hálvthundra› veturs gamal. Gó›i vinur vit ynskja tær hjartaliga tillukku vi› fimti ára degnum í dag, vit bí›a sera spent til í kvøld.
***Heilsan frá okkum "úti í Grønlandi".***



***Gó›i, elska›i Adrian***
Hjartaliga tillukku vi› 2 ára fø›ingardegnum í dag. Alt ta› besta í framtí›ini. Vit elska teg.
***Heilsan mamma og Magni***



***Gó›a mamma***
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum. Her ert tú lítil og fitt.
***Heilsan Annika og Leona***



***Til Arnfinn***
Elska›i sonur og beiggi, hjartaliga tillukku vi› 21 ára degnum 16.10. Harrin signi framtí› tína ynskja
***mamma, babba og systkin***



***Gó›a abbi***
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum. Her er hundalív.
***Elsa***



Gó›a morgun, Jákup Súni, og tillukku vi› 18 ára degnum tann 12. okt. og kanska koyrikortinum.
***Heilsan gita hvør***



***Gó›a, elska›a Johanna***
Hjartaliga tillukku vi› degnum 20.10.
***Bestu heilsanir mamma og babba***